## Fakfelagsrørslan nú og framyvir

Í sambandi við 50 ára hátíðarárið hjá Starvsmannafelagnum, verður leiklutur fakfelagsrørslunnar settur á dagsskrá á almennari ráðstevnu í Norðurlandahúsinum seinnapartin fríggjadagin. Tað er í sambandi við aðalfundin og 50 ára hátíðarárið hjá Starvsmannafelagnum, at felagið nú bjóðar øllum áhugaðum á ráðstevnu um føroysku fakfelagsrørsluna.

– Alt árið í ár er eitt hátíðarár hjá Starvsmannafelagnum. Hendan ráðstevnan er komin í lag, tí vit ynskja at gera eitt sindur meira burtur úr aðalfundinum í ár enn vanligt. Her halda vit tað vera natúrligt at varpa ljós á á leiklutin hjá føroysku fakfeløgunum, bæði søguliga, í dag og framyvir, sigur Selma Ellingsgaard, forkvinna fyri Starvsmannafelagið.

Ráðstevnan verður partvíst skipað við framløgum og partvíst við orðaskifti. John Mortensen, samfelagsfrøðingur, greiðir frá um upprunan hjá fakfelagsrørsluni. Hans Mourits Foldbo, sálarfrøðingur og formaður í Magistarafelagnum, lýsir aktuellu støðuna og avbjóðingar á økinum, og Snorri Fjallsbak, stjóri á lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum, hugleiðir um arbeiðsmarknaðinum í framtíðini. Aftan á framløgurnar verður orðaskifti, sum Øssur Winthereig, journalistur, skipar. Í panelinum verða Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, Sonja Jógvansdóttir, samskipari hjá Samtaki, Selma Ellingsgaard, forkvinna fyri Starvsmannafelagið og Sigmund Poulsen, sakførari.

Ráðstevnan verður í Norðurlandahúsinum fríggjadagin 11. mars kl. 13-16 og øll eru vælkomin, sigur Starvsmannafelagið.



*Við keypinum av EIK er Ognarfelag Tryggingartakaranna vorðin størsti leikari í føroyska fíggjarheiminum, og er tað umráðandi, at somu skipanarligu feilir, sum vóru gjørdir í gamla Eik, ikki verða endurtiknir. Hyggja vit eftir, hvussu OT er skipað, og hvør ger sína ávirkan galdandi, sær tað tíverri út til, at vandi kann verða fyri, at somu skipanarligu skeivleikar kunna verða endurtiknir. Tað eru nógvir nevndarsessir í samtakinum, og kann tað vera freistandi at sleppa at sita í fleiri av hesum fyri góða løn, samstundis sum ein umsitur Føroya størsta maktdepil.*

*Andras Skaalum, umboðsráðslimur*

# Kuupik Kleist vil hava altjóða oljudálkingargrunn

**TÓNLEIKUR** Grønlendingar hava ikki gloymt oljudálkingina í Meksikanska flógvanum

Jan Müller

Tí vilja teir sjálvir rudda slóð fyri oljuleiting. Nú kenna teir eisini altjóða ábyrgd og hava sett uppskot fram um at stovna altjóða oljudálkingargrunn.

Grønland ætlar sær at ganga á odda, tá tað ræður um at koma oljudálking til lívs. Á fundi í Kanada hjá Inuittfólkunum "Inuit Leaders Summit" legði grønlendski landsstýrisformaðurin Kuupik Kleist uppskot fram um ein grunn, sum skal verja móti oljudálking. Grunnurin skal rinda fyri útreiðslur frá oljudálking í sambandi við oljuleiting á opnum havi og framleiðslu av kolvetnum.

Grønland fer at arbeiða fyri, at talan verður um eina heimsumfatandi skipan, sum byggir á eina altjóða konventión. Grunnurin skal eisini byggja á solidariska fígging frá oljuídnaðin, sum byggir á prinsippið um, at tað eru tey, sum dálka, ið skulu gjalda.

Dentur verður lagdur á, at Grønland heldur fram við at átaka sær sínu egnu tjóðskaparligu ábyrgd fyri at tryggja, at oljufeløg, sum arbeiða í grønlendskum sjógvi, kenna fulla ábyrgd og eru fíggjarliga so mikið væl fyri, at tey megna at handfara allar skyldur, sum kunnu tengjast at teirra virksemi.

Ein altjóða grunnur skal ikki broyta tey prinsipp, sum eisini galda í Grønlandi, um ábyrgdina hjá tí einstaka felagnum fyri egnum gerðum.

– Vit halda samtíðis, at vit kunnu fáa gagn av, at vit á altjóða støði skipa fyri eini slíkari skipan, sum gongur tvørtur um landamark, til gagn fyri bæði fólk, lond og ídnaðin segði Kuupik Kleist, landsstýrismaður á fundinum fyri Inuitleiðarar í Arktis og ICC.



*Kuupik Kleist, landsstýrisformaður í Grønlandi*

Grønland fer seinni at mæla til, at uppskotið verður tikið upp í Arktiska Ráðnum eins og Grønland fer at luttaka í samráðingum í altjóða maritima felagsskapinum IMO um at stovnseta altjóða ábyrgdarskipanir í sambandi við oljuvirksemi til havs.

# Meira hjálp til útlendskar kvinnur

**ÚTLENDINGAR**

**Føroyar skulu nú hava ein integrasjónspolitikk, sigur Annika Olsen, landsstýriskvinna**



Randi Jacobsen

Heildarætlanin viðvíkjandi harðskapi í parlagi og nærsambondum staðfestir, at føroyska samfelagið ikki tekur sær nóg væl av útlendskum kvinnum í Føroyum.

- Vit fara nú at orða ein integrasjónspolitikk, sigur Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum.

Hagtølini hjá Kvinnuhúsinum vísa, at heilt nógvar útlendskar kvinnur ikki hava tað gott í Føryum. Eitt ár vóru yvir 20 prosent av teimum kvinnum, sum gistu í Kvinnuhúsinum, útlendskar kvinnur.

- Hetta eru ræðandi tøl, sigur Annika Olsen.

Eitt tilmæli er at broyta føroysku útlendingalógina samsvarandi ásetingunum í donsku útlendingalógini soleiðis, at útlendingar, ið skulu sameinast við maka í Føroyum, kann fáa noktað uppihaldsloyvi, um makin í Føroyum hevur fingið frælsistøku fyri ávís revsirættarlig misbrot móti fyrrverandi maka ella hjúnarfelaga.

Útlendskar kvinnur eru í serliga viðkvæmari støðu í Føroyum, tí tær kenna ikki samfelagið, kenna ikki síni rættindi, hava onga familju, og tær duga sum oftast ikki málið.

Tað ræður um at hava upplýsandi tilfar á nøkrum høvuðsmálum, tá ið útlendskar kvinnur koma til landið.

Kvinnurnar skulu eisini hava rætt til tulk, tá ið tær skulu samskifta við myndugleikar í Føroyum.

Hetta er nakað av tí, sum nevnt er í heildarætlanini.